

Transocean Arctic. Foto: VNG

# Faroe Petroleum hevur gjørt avtalu um boring av Brasse-brunninum

**Jógvan Hugo Gardar**

26.12.2015 - 13:06

Oljan.fo

Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum (FP), sigur í eini viðmerking til íleggjarar, at hann er sera væl nøgdur við at FP hevur undirskrivað eina avtalu um boripall í samband við leitingina eftir olju í Brasse-brunninum í norskum sjógvi. FP eigur 50 prosent av hesum loyvinum.

- Tað er spenanndi fyri okkum at vit hava fingið undirskrivað avtaluna fyri tann fyrsta av trimum leitibrunnum sum vit hava sett á skrá fyri 2016. Tað verður Transocean Arctic, sum skal bora Brasse-brunnin. Hetta er sami boripallur sum vit brúktu í samband við Píl-fundið í 2014. Vit hava samstundis tryggja okkum at kostnaðarstøði er so mikið lágt at møguleikin fyri at kolvetni kann útvinnast eisini er um orkuprísurin er sera lágur, sigur Graham Stewart.

Hann leggur afturat hóast støðan er sera krevjandi fyri alla oljuvinnuna, so hevur Faroe Petroleum eina trygga fíggjarliga støðu, og útlitini eru góð við teimum ætlanunum sum FP er við í.

- Vit gleva okkum til at fara undir tær tríggjar leitiætlaninar sum vit hava sett á skrá í 2016, og sum vit royna at gera so kostnaðareffektivar sum gjørligt. sigur Stewart.

Kostnaðurin fyri tænastur sum boring er lækkaður nógv aftaná at olju- og gassfeløgini hava minka um sítt virksemi. Tí eru nógvir boripallar og frálandsskip tøk á marknaðinum til munandi lægri leigukostnað enn bara fyri stuttari tið síðani. Tað eru hesir møguleikarnir til at fáa leiga rímuligar tænastur sum Faroe Petroleum nú roynir at brúka.